# Stór framgongd hjá Føroya Tele



*Andras Róin, stjóri fyri Føroya Tele, fegnast yvir gongdina higartil í ár, men hann roknar við harðari kapping í framtíðini. Í tí sambandi vil hann sleppa at bjóða fleiri produktir.*

**Fartelefonirnar fáa pengarnir at streyma inn hjá Føroya Tele. Fyrra hálvár gav 27,3 mió. í yvirsktoi**

ROKNSKAPUR
*Heri á Rógvi*

Tað gongur strálandi hjá Føroya Tele. Hetta kann valla vera nakar ivi um. Hálvársúrslitið fyri 2002 vísti eitt yvirskot áljóðandi 27,3 mió. Hetta er 32,5% betri enn í fjør, tá yvirskotið var 20,6 milliónir fyri teir fyrstu seks mánaðirnar. Úrslitið gjørdist 27,3 mió. kr., eftir at 6,8 mió. kr. eru settar av til skatt og 0,6 mió. kr. eru settar av til landskassan fyri rakstur av Fjarskiftiseftirlitinum. Í fyrsta hálvári 2001 gjørdist úrslitið aftan á skatt o.a. 20,6 mió. kr., og er sostatt talan um ein vøkstur í úrslitinum upp á 6,7 mió. kr., ella 32,5 %

Hóast fleiri gjaldslækkingar í hálvárinum og øktari kapping á fleiri økjum, øktust samlaðu inntøkurnar við 8 % úr 133,5 mió. kr. upp í 144,6 mió. kr.

– Í fyrsta hálvári 2002 hækkaði talið av fartelefonkundum við 17 % til 28.646 kundar. Hinvegin lækkaði talið av fastnetskundum og talið av internetkundum við uppringdum sambandi vegna øktari kapping á økjunum, skrivar Føroya Tele í tíðindaskrivi. Fyrstu 6 mánaðirnar í ár hækkaði eginpeningurin við 27,3 mió. kr. og var samlaði eginpeningurin 234,9 mió. kr. tann 30. juni 2002, svarandi til eitt trygdarevni upp á 56 %.

### Vinningurin av fartelefonum

Sum nevnt vaks talið á fartelefonkundum við heili 17% fyrsta hálvári í ár.

Fartelefonirnar hava seinnu árini verið høvuðsorsøkin aftanfyri stóru yvirskotini hjá Føroya Tele. Andras Róin, stjóri fyri Føroya Tele, sigur, at gongdin á fartelefonøkinum hevur verið ógvuliga positiv, og fartelefonirnar eiga størsta partin av risayvirskotinum hjá Føroya Tele.

Hann metir, at talið av kundum liggur í dag um teir 29.000. Hetta merkir, at eini 61% av øllum føroyingum hava fartelefon. Hetta er seks av hvørjum tíggju.

Stjórin á Føroya Tele fegnast um úrslitið, og roknað verður við, at hetta gevur útlit fyri ársúrslitið.

### Kapping

Føroya Tele hevur fyri fyrra hálvár í ár – eins og í fjør – kent sviðan av øktu kappingini innan fjarskifti í Føroyum.

Føroya Tele er enn einasti veitarin av GSM og NMT fartelefontænastum, men á fastnetøkinum og á Internet-økinum fær Føroya Tele kapping.

Kappingin hevur so m.a. havt ta ávirkan, at Føroya Tele ikki hevur nátt einum av sínum fíggjarligu málsetningunum, sum var at fáa ein 10% vøkstur í nettosøluni. Hesin vøksturin gjørdist "bert" 8%.

Seinni í heyst kemur so kapping á GSM-økinum, tá Kall fer undir sítt virksemi av hesum slag.

Andras Róin sigur, at teir mugu rokna við at tapa eitt sindur av teirra marknaðarparti orsakað av kappingini.

Andras Róin sigur, at teir ikki hava heilt somu møguleikar sum eitt nú Kall við at geva avsláttur. Hann vísir á, at teir ikki kunnu bjóða produktir, har teir seta saman eitt nú GSM og fastnet. Hesum við Fjarskiftiseftirlitið - í øllum førum enn – ikki loyva.

– Hetta er ein trupulleiki fyri okkum, sigur Andras Róin.

### Íløgur

Føroya Tele stendur fyri fleiri stórum íløgum. Føroya Tele skal hava nýtt høvuðssæti í Hoyvík, og so skal aðrar íløgur gerast í útgerð. Eisini skulu nógvir pengar nýtast til FarIcekaðalin, ið verður lagdur næsta summar.

Andras Róin roknar ikki við, at allar hesar íløgurnar verða fíggjaður um raksturin, hóast gongdin er sera positiv.

Spurdur, sigur Andras Róin, at hann metir tað natúrligt, at Føroya Tele verður einskilt, nú farið verður í holt við javna kapping.

Við vinningini fyrsta hálvár í ár er eginpeningurin hjá fyritøkuni 235 milliónir.



*Eini 29.000 fartelefon hald eru í Føroyum, og tey eru Føroya Tele øll, og tey fáa niðastu linju at síggja gott út.*



UTTAN ÚR HEIMI

# USA stóð tilbúgvið í gjár

*Heldur ikki í USA váðaðu myndugleikarnir nakað. Á aðrari myndini síggjast alvápnaðir løgreglumenn í Times Square í New York, og á hinari myndini sæst ein rakettskjótistøð uttan fyri Washington. Støðin hevur rakettir, sum eru ætlaðar at skjóta flogfør niður við. Eftir boðum frá Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra vórðu støðir av hesum slagnum settar upp rundan um allan Washington í gjár.*






*Sum hesar báðar myndirnar vísa, stóð USA tilbúgvið í gjár. Fyrrakvøldið boðaði John Aschroft, løgmálaráðharri frá, at myndugleikarnir høvdu fingið álítandi ábendingar um, at yvirgangsmenn ætlaðu at søkja at amerikanskum málum. Serliga varð hugsað um amerikansk mál uttanlands, og tí vórðu fleiri amerikanskar sendistovur stongdar í gjár. Aðrastaðni var vaktarhaldið styrkt munandi.*

# USA hóttir heimsfriðin

**Fyrrverandi suðurafrikanski forsetin og friðarheiðurslønarvinnarin Nelson Mandela heldur, at áhaldandi mistøk í amerikanska uttanríkispolitikkinum hótta heimsfriðin.**

HEIMSFRIÐURIN
*Árni Joensen:*

Tað vakti stóran ans, at Nelson Mandela kom við sínum atfinningum at amerikanska uttanríkispolitikkinum í gjár á ársdegnum fyri yvirgangsatsóknirnar tann 11. september í fjør. Lesararnir løgdu eisini til merkis, at Newsweek lýsti Mandela sum tann av øllum monnum, ið heimurin hevur størstu virðing fyri.

Í samrøðu við amerikanska tíðarritið Newsweek segði Mandela, at í mong ár hevur USA framt mistøk á tí uttanríkispolitiska økinum, og hesi mistøk hava mong ár seinni fingið óhepnar avleiðingar. Tað er lítið at ivast í, at hann við hesum seinna sipaði til tað, sum hendi fyri einum ári síðani, men hann nevndi tó ikki atsóknirnar at World Trade Center og Pentagon.

Sum eitt tað størsta amerikanska uttanríkispolitiska mistakið nevndi Nelson Mandela avgerðina at fíggja og vápna mujaheddin-uppreistrarmenninar í Afghanistan í áttatiárunum. Hesin politikkurin beindi sambært Mandela fyri teirri loysnini, sum Sovjetsamveldið hevði tikið undir við, tá landið játtaði at taka sínar hermenn úr Afghanistan.

Nelson Mandela sigur, at við sínari avgerð gjørdi USA sítt til, at tann víðgongda Talibanrørslan kom til valdið í Kabul. Amerikanarar løgdu seinni Taliban undir at hýsa og verja Osama bin Laden og felagsskap hansara al-Qaeda, sum á støðum sínum í Afghanistan legði yvirgangsatsóknirnar at USA tann 11. september í fjør til rættis.

Í samrøðuni við Newsweek finst Mandela eisini hvassliga at George W. Bush, forseta og bretska forsætisráðharranum Tony Blair fyri ætlan teirra at leypa á Irak.

– Hvørki Bush ella Blair hava lagt fram eitt einasta prógv fyri, at Irak hevur hópoyðingarvápn. Tað, sum vit vita, er, at Ísrael hevur slík vápn. Men tað tosar eingin um. Hví skulu vit nýta eina mátieind fyri summi lond og eina aðra fyri onnur lond, spyr Nelson Mandela í samrøðuni við Newsweek.

## Vatnkríggj

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, ávaraði í gjár libansku myndugleikarnar ímóti at gera álvara av einari ætlan um at veita vatn úr ánni Hasbani.

Hasbani-áin er ein av teimum norðastu áunum, sum rennur í Jordanánna, og libanar hava ætlanir um at veita vatn haðani.

Men tað vil ísraelski forsætisráðharrin ikki hoyra talan um. Á einum fundi í gjár við ísraelskar embætismenn segði Sharon, at ger Libanon álvara av ætlanini, kann tað enda við kríggi millum tey bæði londini, tí vatnið í Jordanánni hevur alstóran týdning fyri Ísrael.

## Sleppur undan revsing

Ovasti kærurætturin í Kili hevur sótt fyri at taka tað løgfrøðiliga ógegnið frá fyrrverandi einaræðisharranum Augusto Pinochet.

Málið kom fyri kærurættin eftir áheitan frá einum dómara, sum krevur, at Pinochet verður revsaður fyri at hava verið uppií, tá ein av hansara politisku mótstøðumonnum varð myrdur í 1974.

Tann myrdi var herovasti, innanríkisráðharri og varaforseti hjá Salvador Allende, forseti, sum varð koyrdur frá, tá Pinochet tók valdið í Kili í 1973. Júst tað, at Pinochet hevur verið ríkisleiðari, ger sambært kærurættinum, at hann kann ikki rættarsøkjast.

## Sveits á aðalfundi

Tá tann 57. ST-aðalfundurin varð settur í New York týsdagin, varð samstundis staðfest, at Sveits nú er limur í heimsfelagsskapinum. Avgerðina um limaskap tók sveitsiska fólkið á einari fólkaatkvøðu.

Sveits er 190. landið, sum er limur í ST, og gongst eftir ætlan, kemur land nummar 191 upp í felagsskapin seinni í hesum mánaðinum. Tað er Eysturtimor, sum ætlandi fær sín limaskap staðfestan tann 27. september.

Í gjár var steðgur á aðalfundinum til minnis um tey, sum doyðu í yvirgangsatsóknunum 11. september í fjør.

## Skyldólkini skulu takast

Ein dómari í Nicaragua hevur givið løgregluni boð um at handtaka 14 fólk, sum standa landsins fyrrverandi forseta, Arnaldo Aleman, nær.

Myndugleikarnir vilja vera við, at skyldfólkini hjá fyrrverandi forsetanum hava svikað fyri einar 10 milliardir dollarar. Tey eru eisini skuldsett fyri at hava misnøtt almennar ognir.

Arnaldo Aleman sjálvur er ikki tikin, men dómarin, sum gav boð um at handtaka skyldfólk hansara, sigur, at navnið á fyrrverandi forsetanum er komið undan kavi fleiri ferðir undir rannsóknunum hjá løgregluni. Tær serligu gegnisreglurnar gera, at fyrrverandi forsetin kann ikki rættarsøkjast.